# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Signheðin Olsen, Tvøroyri, 65 ár

Sunnudagin 21.september fyllir ein vælkendur vágbingur, Signheðin Olsen, 65 ár. Eg sigi vágbingur, tí sjálvt um Signheðin hevur búð á Tvøroyri í mong ár, so hevur hann traðkað sínar barnaskógvar, er uppvaksin og liva síni fystu mandómsár í Toftalíð í Vági, har foreldur hansara settu búgv. Mamman, Elisabeth, var ættað úr Tjørnuvík og faðirin, Niclas Olsen, vanliga nevndur Niclas í Skorti, var ættaður av Marknoyri í Vági. Elisabeth og Niclas áttu 2 børn, Gudbjørg og Signheðin. Signheðin giftist við Eyðnu av Tvøroyri. Tey fingu 2 børn, Anniku og Mikkjal. Og abbabørnini hjá Signheðini eru 3 í tali. Signheðin og eg eru javnaldrar, og vuksu vit báðir upp í Toftalíð í friðarligum og hjartagóðum umhvørvi. Toftalíð var tann nýggjari parturin av Vági, ið liggur uttanfyri gamla bøgarðin, og tá ið vit vóru óvitar, vóru tað mest ung fólk ið høvdu búsett seg í Toftalíð, og tí vóru eisini nógvir óvitar har á okkara aldri. Ikki gekk altíð friðarliga fyri seg innandura hjá teimum ymisku foreldrunum, tí serliga dreingjabørn geva nógvan larm frá sær, men tey eldru vóru barnavinarlig og toldu altíð okkum dreingjabørn, og var hetta eisini galdandi fyri Elisabeth og Niclas eins og øll hini foreldrini. Elisabeth var serliga góð við meg, og Niclas dugdi væl at skapa sær við teimum yngru, eisini hann var góður við børn. Jú, okur, ið tá vuksu upp í Toftalíð, hava nógv at takka teimum eldru fyri. Flest øll teirra hvíla undir grønutorvu, og friður veri við minnunum um tey.

Signheðin, nú eru vit báðir farnir at eldast, men enn sæst ikki høgg á føti á tær. Man skuldi trú, at tað var ein unglingi uppá fjøruti, tá ið man sær teg spelkin og fattur fara eftir vegnum, og stinnur ert tú, 65 ára gamal, liggur alt árið til sjós, fyri tað nógva úti á Føroya banka og annars vesturi í havi og draga gørn. Tað eru ikki allir, ið gera tær hetta eftir. Tú ert ein av føroya rasku synum, tí tað er bert tað, ið úr sjónum kemur, ið landið livir av, og enn balist tú har úti fyri at byggja land.

Signheðin hevur verið sjómaður, frá tí hann fekk prestsins hond á høvðið, tá ið pápin tók hann við sær til útróðrar við "Orminum". Pápin var útróðrarformaður í nógv ár, so har fekk Signheðin sín fyrsta lærdóm um sjógvin.

Fyrsta skipið, ið Signheðin fór við var "Johanna". Tað var í 1953 teir fóru til Íslands við Jóan Jakki í Leirvík sum skipara. Signheðin var nógv ár við Páll Horn sum skipara, fyrst við "Sct. Jack" og síðan við "Òla Horn", tá ið hann kom í 1960. Hetta var eitt tað størsta umskifti, ið Signheðinsa sjómanslívi, at skifta frá dangunum til ein spildurnýggjan línubát. Signheðin hevur verið við nógvum fiskiskipum, bæði føroyskum og norskum. Hann var lastamaður við "Hans Erik" úr Klakksvík í 10 ár. Íalt 18 túrar við Fl. Cap, og ongantíð vóru teir á minstuløn.

Signheðin, tú vart eisini ein av slóbrótarunum, saman við Petur Ludvík av Tvøroyri, at byrja við gørnum eftir havtasku við Føroyar.

Mangan lá tær vátt undir føti, og skal eg nema við onkra hending, ið tær hevur verið fyri.

I 1959 var Signheðin við 30 tonsaranum "Víkingi" av Ólavsvík, tá ið teir fingu ein sjógv og báturin sprakk lekk. Tá var ikki gamansleikur, og tað stóð um lív hjá manningini. Teir mundu gingið burtur.

Tað var eisini í 1959 við sama báti, at teir vóru úti í einum øðrum ódnarveðri og hvussu ringur standurin enn var hjá teimum, máttu teir koma einum øðrum 30 tonsara, „Fróða" til hjálpar, sum var við at søkka. Seinni kom so trolarin „Juni" til hjálpar og loysti teir á "Víkingi" av. "Juni" fór so eftir bjargingina beinleiðis á Akranes og so til New Foundlands og gekk burtur har við mann og mús í sama ódnarveðrinum, sum „Hans Hedtoft" gekk burtur í. Føroyingar vóru eingir við „Juni", tá ið hann gekk burtur, men tað vóru nógvir, sum komu yvir til Íslands fyri at fara við, har í millum fleiri tvøramenn, men teir blivu ov seinir, og „Juni" sigldu bara undan teimum, menninir komu so at gista á sjómansheiminum.

Í 1973 var Signheðin við norska garnaskipinum "Vartal" í Grønlandi.

Teir vóru á Fyllabank og eldur kom í skipið, og farið varð í gummibátarnar. Tveir vóru gummibátarnir, og 6 mans fóru í annan og 13 mans í hin. Teir rókust á havinum í 19 tímar, til ein týskur trolari tók teir upp. Ódnarveður var og bátarnir hingu saman at byrja við, men so kundu teir ikki meira, tí teir vóru bangnir fyri, at illveður kom at forkoma teimum. Tað vóru 7 føroyingar við "Vartal" hendan túrin. Ein vágbingur Anfinn Olsen var í øðrum gummibátinum, og hinir 6 vóru í gummibátinum við 13 monnum. Teir vóru Terji Hammer av Tvøroyri, Johs. Lindenskov úr Vági, teir 3 brøðurnir Leif -, Jógvan- og Fritjof Joensen, allir úr Vági og Signheðin Olsen úr Vági. Veðrið var ringt, og náttin var ring at koma ígjøgnum. Signheðin tonkti, at hevði pabba vita, so hevði hann havt biðið fyri okkum. Men hjá teimum gekk alt væl, og sum sagt, ein týskur trolari tók teir upp, men 3 mans, 3 normenn fórust við "Vartal" hendan túrin, teir brendu allir inni umborð. Eldurin var so umfatandi, at "Vartal", sum varð sleipaður inn í ein Grønlendskan fjørð brendi í 3 døgn, áðrenn menn bastu eldinum. Mangan, tá ið so er, er ikki altíð gott hjá teimum, sum heima eru. Eingi boð kundu sendast heim, um at allir føroyingarnir vóru bjargaðir, tí familjan hjá normonnunum, sum deyðir vóru, skuldi fyrst fráboðast, men útvarpið bar tíðindi um, at 3 mans vóru deyðir við „Vartal", so øll avvarðandi vóru sjelkað. Eg skal nevna, sum eitt kuriosum, at Niclas, faðir Signheðan, var róligur og royndi at sissa øll. Hann hevði droymt tilbuðin um náttina og segði, at Signheðin var á lívi, tað var hann vísur í. Millum okkum í Toftalíð og millum manna yvirhøvður vistu vit, at Niclas var ein maður, sum visti meir enn onnur. Hetta var ikki einasta „tildragilsi" frá Niclasi.

Tað er ikki lítið, ein sjómaður sum Signheðin veit at siga frá, sum hevur balst á havinum í meir enn 50 ár. Stuttligt er at hoyra hann greiða frá, og serliga væl minnist hann aftur.

Vitjar Signheðin suður um Hovseggina, so hyggur hann altíð inn á gólvið hjá okkum. Sigast má, at vit báðir hava altíð verið nær knýttir hvør at øðrum, og takk skalt tú hava frá mær, fyri, at tú altíð hevur verið trúfastur, tí mangan hevur leika hart á á teimum ymisku vígvøllunum, men eg visti altíð, hvar eg átti ein hollan vin.

Í dag ert tú missiónshúsinum á Tvøroyri ein góður stuðul, og hevði tað frøtt foreldur tíni, um tey vistu, at tað var gingist tær á hendan hátt, serliga pápa tínum, sum var ein av leiðandi monnunum innan missiónshúsið í Vági.

Í dag ert tú giftur við Monsu, ættað úr Hvalba, og takki eg tær og Monsu fyri hugnaligar løtur í heimi tykkara á Tvøroyri.

Føðingardagin leitar tú tær norðureftir, norður ímóti Tjørnuvík, til har, ið rótin rann. Við allari familjuni heldur tú dagin á Hotel Eiði, og fari eg her frá Marnu og mær at ynskja tær hjartaliga til lukku við 65 ára degnum, og má Harrin signa tykkum og geva tær nógv góð ár enn saman við tínum.

**Jákup Olsen**

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Jóannes Eidesgaard einki at ræðast

**At Jóannes Eidesgaard var fullur og datt av undir einum almennum borðhaldi fer neyvan at kosta honum politiska lívið. Næstformaður Javnaðarfloksins heldur ikki, at Jóannes hevur nakað at ræðast, ein føroyskur floksformaður slær ikki hondina av honum, og ein, ið sjálvur fór frá sum floksformaður eftir eina fulla nátt, heldur ikki, at aktuella málið kann samanberast við hansara umstøður**

ALKOHOLPOLITIKKUR

*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard viðgekk í Degi og Viku hóskvøldið, at hann datt av undir einum almennum borðhaldi, har millum onnur 25 útlendskir sendiharrar við makum vóru hjástødd. Í Degi og Viku bað Jóannes Eidesgaard um fyrigeving, og nógv bendir á, at tað fer formaður Javnaðarfloksins at fáa.

Bergur Dam, næstformaður Javnaðarfloksins, skal í dag á fund saman við restini av floksleiðsluni, har óhepni atburðurin hjá Jóannes Eidesgaard verður eitt av evnunum. Hann metir ikki, at Jóannes Eidesgaard hevur nakra orsøk at ræðast fyri fundinum.

- Jóannes Eidesgaard hevur gjørt eitt mistak. Men hann hevur eisini havt tað dirvi at standa alment fram og viðganga sítt mistak og lova, at tað sama ikki hendir aftur. Tað taki eg í fullum álvara, og tað fer at gera viðgerðina á fundinum nógv lættari, væntar Bergur Dam.

Sjálvur heldur hann ikki, at óhepni atburðurin hjá Jóannesi Eidesgaard eigur at fáa avleiðingar fyri formanssessin í flokkinum, og tað væntar hann heldur ikki fer at henda.

### Ongan alkoholtrupulleika

Spurdur um Jóannes Eidesgaard hevur ein alkoholtrupulleika, svarar Bergur Dam, at tað hevur hann ikki sær vitandi.

- Eg havi kent Jóannes Eidesgaard síðan vit vóru smádreingir, og eg eri ikki av teirri fatan, at alkohol er ein trupulleiki fyri hann. Hetta var heldur ein einsamøll óheppin hending enn eitt generellur trupulleiki, sigur Bergur Dam. Hesum er næstformaðurin so mikið vísur í, at hann ikki ætlar sær spyrja floksformannin, um hann hevur alkoholtrupulleikar.

### Engell fór

Ein, sum hevur upplivað hvussu nakað nógv av tí váta slagnum á skeiva staðnum kann kosta politiska lívið, er Hans Engell, fyrrverandi verjumálaráðharri í Danmark. Hans Engell koyrdi fullur, rendi á ein betongklossa og takkaði síðan fyri seg sum formaður fyri Konservativa Fólkaflokkin. Hann heldur tó ikki, at hendingin, sum Jóannes Eidesgaard var fyri, kann samanberast við hansara egnu lagnu.

- Eg var ikki í almennum ørindum, tá hatta hendi og annars kunnu hasar báðar hendingarnar als ikki samanberast, sigur Hans Engell, sum hevur tað við at gerast rættiliga fáorðaður tá hendingin, ið kostaði honum politiska lívið, verður tikin fram.

Tað kemst tó ikki uttanum, at tað var ein hending, har júst alkoholnýtsla var í miðdeplinum, sum gjørdi, at Hans Engell noyddist frá.

- Hatta hendi fyri seks árum síðan, og eg havi sagt tað, sum er vert at siga um hatta. Hasi málini kunnu als ikki samanberast, og Jóannnes Eidesgaard sleppur at klára hasa sakina uttan mínar viðmerkingar, sigur Hans Engell.

### Russisk roulette

Óli Breckman, formaður Fólkafloksins, hevur fyrr verið í samgongusamráðingum, har Jóannes Eidesgaard hevur verið uppi at vent sum løgmaður, og kann væl koma í somu støðu aftur. Kann óhepna hendingin á almenna borðhaldinum fara at ávirka møguleikan hjá javnaðarfloksformanninum at gerast eitt nú løgmaður?

- Eg veit ikki um hatta kann fara at gerast ein absolutt forðan ella ein relativ forðan. Um hatta er ein trupulleiki, og tað má Jóannes Eidesgaard sjalvur avgera um tað er, so er tað meira ein persónligur trupulleiki enn ein politiskur trupulleiki. Og um hann fær loyst tann persónliga trupulleikan, so er tann politiski trupulleikin skjótur at loysa, sigur Óli Breckman.

### Ikki óvæntað

Fólkafloksformaðurin heldur tað ikki vera løgið, at slíkt, sum tað ið hendi á almenna borðhaldinum hóskvøldið í farnu viku, kemur fyri av og á.

- Man spælir so nógva russiska roulette við alkoholi í almennum samanhangi, og at onkur kúla gongur av við hvørt, má man ikki undrast yvir tað. Tú hevur eina almenna veitslu fyri og eina eftir, har eitt heilt selskap situr og hugnar sær við einum arsenali av gløsum framman fyri sær, og tað er í grundini nokkso undarligt at ikki fleiri óhapp henda enn tað gera. Eg haldi at man sum heild sleppur ótrúliga væl.

Óli Breckman er til reiðar at síggja hendingina sum eitt óheppið mistak, sum ikki fær avleiðingar fyri framtíðar samstarv við Javnaðarflokkin.

- Eg skal ikki sláa hondina av Jóannes Eidesgaard orsakað av hasum. Eg vóni bara at hann sleppur sum frægast burturúr hasari støðuni hann er komin í, og hann skal fáa øll tey bestu ynskini frá mær, sigur Óli Breckman, formaður Fólkafloksins.

# Føroyingar fyri vanbýti í Idols og Stjerne for en Aften

**Fyrst slapp Jens Marni Hansen ikki at luttaka í Stjerne for en aften, og nú sleppur ein annar føroyingur heldur ikki at halda fram í tónleikakappingini Idols hjá TV3. Talan er um Ásu Kathy Dam, sum kennir seg snýtta av donsku sjónvarpsrásini**

TÓNLEIKAKAPPINGIN IDOLS

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*- Eg kenni meg snýtta av TV3, tí eg fekk at vita at alt var í lagi við fløguni, og tí skilji eg ikki støðuna hjá TV3*

*Mynd: Bárður Eklund/BT*

Ein kann róliga staðfesta, at føroyingar rættiliga eru fyri vanbýti í donskum tónleikakappingum í hesum døgum. Eftir sigurin hjá Guðrun Sólju Jacobsen í Stjerne for en aften í fjør, hava fleiri føroyingar roynt eydnuna í ymiskum tónleikakappingum í Danmark í ár.

Kollfirðingarnir, Jens Marni Hansen og Ása Kathy Dam, hava ávíkavist vunnið seg fram til at verða við í Stjerne for en Aften og Idols hjá TV3. Fyrr í vikuni boðaði Danmark Radio Jens Marna frá, at hann kortini ikki sleppur at luttaka, tí hann hevur áður givið fløgu út, og sambært reglugerðini er tað ikki loyvt.

Í dag hevur Ása Kathy Dam fingið sum boð, at hon heldur ikki sleppur at halda fram, tí hon verður á eini fløguútgávu í Føroyum seinni í ár.

Í grein í BT í dag, sum føroyingurin, Fróði Holm Knudsen hevur skrivað, stendur, at Ása Dam upprunaliga hevði boðað TV3 frá um fløguna, og tað varð ikki mett at verða nakar trupulleiki. Kortini er Ása nú koyrd úr kappingini, tí TV3 vil kortini ikki loyva, at luttakararnir eru við á fløguútgávum. Hetta er ein stak oheppin støða, tí Ása hevði vunnið seg heilt fram millum tey 30 seinastu í kappingini.

– Eg kenni meg snýtta av TV3, tí eg fekk at vita, at tað við fløguni var í ordan, og hon kemur jú eisini bara út í Føroyum, og eg eri heldur ikki bundin at nøkrum sáttmála við fløguútgevara, og tí skilji eg ikki støðuna hjá TV3, sigur Ása Dam við BT.

### Fær peningin aftur

Ása hevur mist nógvan pening í samband við tónleikakappingina, men TV3 lovar at rinda henni peningin aftur. Jakob Mejlede, ein av stjórunum í TV3, sigur, at Ása fær sum eitt plástur á sárið allar ferðaútreiðslurnar aftur.